

*Tey, sum fara í Lítlu Dìmun við báti, ganga upp í Oynna hendan vegin. Tað er ikki so hættisligt, sum tað sær út til at vera. Mitt í myndini síggjast fólk fara upp eftir og ovast í høgra horni sæst annað húsið í Lítlu Dímun*



*Av toppinum er fantastiskt útsýni. Hersæst inn á Hvalba og Sandvík*



*Hetta er húsið fyri norðan á Oynni. Her er pláss fyri 25 fólkum*

ari verður við á hvørjum túri og leiðbeina fólki.

Og hóast Lítla Dìmum bæði er minsta og einasta óbygda oyggin í Føroyum, er hon søgurík og ferðaleiðararnir vita nógv at fortelja um strandaðar skipsmanningar, um fólk, sum ikki sluppu av av aftur oynni, um fugl og seyð og annað mangt.

## Gera góðar umstøður

Tað, sum nú er eftir at gera áðrenn teir bjóða ferðafólki vælkomnum í Oynna, er at merkja rásirnar av, sum gangast kann eftir. Har er ætlanin at seta prestar upp við nummari á og so er ætlanin at útflýggja hvørjum ferðafólkið eitt kort við prestunum á, so at tey alla tíðina síggja, hvar tey eru stødd.

Ætlanin er eisini at fáa wc viðurskiftini í báðum húsunum í rættlag, eins og ætlanin er at klæða og bjálva húsini. Og sum frálíður er eisini ætlanin at gera tyrlupláss á Hellurókina, beint við renningina niður á bátin fyri at hava ein møguleika afturat at koma og fara, tá ið veður og vindur ikki er til vildar

Sum frálíður er eisini ætlanin at gera aðrar ábøtur, eitt nú at sprongja eina rás fyri at gera uppgongdina í Oynna rættiliga góða.

Tað verður Kunningarstovan á Tvøroyri, sum fer at samskipa ferðirnar.

Sjálvir meta teir, at stórur áhugi verður fyri at sleppa út í oynna.

– Tað er eitt heilt serligt upplivilsi at vera í Lítlu Dímum. Her er fullkomiligur friður og náttúran er bæði stórbær og avbjóðandi. Tey, sum dámar at ferðast í náttúruni, fæst ikki betri útferð, siga teir báðir. Hetta er eisini ein ferð, har sleppa fólk veruliga at royna sín egna kropp í eini stórfingnari náttúru, leggja teir afturat.

Og tey, sum vilja, kunnu fáa eisini avtalu um mat og um at sleppa undir tak í Roynhúsinum í Hvalba, tá ið tey koma av aftur Oynni.

Ólógligar ferðir

Samstundis sum teir nú fara undir hesar ferðirnar, ætla teir at steðga teimum óskipaðu ferðunum, sum eru í oynna av og á.

– Lítlu Dímun er ikki heilt vandaleys hjá fólki, sum ikki er staðkent og tí er tað heilt avgjørt óráð hjá fólki at fara út hagar av sínum eintingum.

– Og so er tað harafturat ólógligt, tí Oyggin er privat ogn, so ongin hevur loyvi at fara út hagar, uttan við loyvi frá eigarunum.

Teir vita eisini um fólk ið taka pening frá ferðafólki fyri at seta tey á land í Lítlu Dímum og óbodnir gestir hava enntá verið inni í húsunum, men tað er altso beinleiðis ólógligt.

Annars siga Róin Schrøter og Signar Olsen, at áhugin fyri Lítlu Dímun er nógv vaksin aftur eftir at hava verið dalandi í nógv ár.

Serliga fegnast teir um at nógv ungfólk eru farin at vísa oynni áhuga aftur, men tað halda teir kemst av, at umstøðurnar eru batnaðar og tað er lættari at sleppa í Oynna, serliga við stongini.